# Kasparov russiskur meistari

**Sterkasti russiski meistaraskapurin síðani 1988 endaði leygardagin. Garry Kasparov var í serklassa og vann ruddiliga**



*Gary Kasparov hevur í 20 ár verið hægstur á altjóða styrkislistanum. Hann hevur í dag 2.855 ratingstig*

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eftir fyrstu fýra umførini tyktiskt tað ikki sum um, at Garry Kasparov fór at skúgva flestu mótstøðuna til viks. Hann hevði vunnið eitt talv, leikt tríggir javnleikir og lá tá á øðrum plássi aftanfyri Alexander Grischuk. Í tí eina javnleikinum yvirsáð Kasparov ein hampiliga lættan vinnandi leik og nógv metti tí kanska, at 41 ára gamla legendan ikki hevði nóg nógva orka at stríðast um heiður og æru á hesum sinni. Úrslitini seinastu tvey árini tala eisini fyri, at Kasparov hevur mist nakað av stjørnuglæmuni hjá sær.
Tó so, eftir varðligu byrjanina, vann Kasparov fýra talv á rað og legði seg samstundis trygt á odda innan seinastu tvey umførini. Eingin megnaði at fylgja spurtinum hjá Kasparov, sum einfalt telvaði í serklassa.
Innan tíggjunda og seinasta umfar, var kappingin um fyrsta pláss avgjørd. Nærmasti kappingarneytin hjá Kasparov, Grischuk, tapti óvæntað í níggjunda umfari ímóti Alexander Korotylev. Við javnleikinum í sama umfari móti Alexander Morozevich, hevði Kasparov hálvtannað stig niður til teir næstu í røðini, Grischuk og Alexey Dreev.

### Stríðsvilji

Øll høvdu framanundan vónað at talvið millum Kasparov og Grischuk í seinasta umfari, fór at verða eitt slag av einum finalutalvið. Kappingin var tíverri longu avgjørd og eingin hevði tí kritiserað teir um ein skjótur javnleikur varð úrslitið. Men nei, báðir vildu vinna og faktiskt varð hetta talvið eitt tað drúgvasta í seinasta umfarinum. Grischuk - við hvíta fólkinum í yndisbyrjanini hjá Kasparov, Naidorfvarianturin í sisilionskum - trýsti mestapartin av talvinum. Í tíðneyðini vann hann eisini eina finnu, men Kasparov vísti góðan endatalvsteknikk og teir samdust um javnleik beint eftir tíðarneyðin var av.

### 20 ár á toppinum

Kasparov hevði eina avriksstyrki (performance rating) uppá 2855, sum merkir at hann vinnur sær sindur av rating fyri kappingarsigurin. Í tjúgu ár hevur hann verið ovastur á ratinglistanum og við sigrinum í Moskva heldur hann fast um hesa støðu. Indarin Viswanathan Anand (2781) er beint í hølunum og fleiri eru tey sum vænta, at indarin yvirhálar russaran í 2005.

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| Garry Kasparov | (2813) | 7,5/10 |
| Alexander Grischuk | (2704) | 6,0 |
| Alexey Dreev | (2698) | 5,5 |
| Alexander Morozevich | (2758) | 5,0 |
| Alexander Motylev | (2651) | 5,0 |
| Peter Svidler | (2735) | 5,0 |
| Evgeny Bareev | (2715) | 5,0 |
| Alexey Korotylev | (2596) | 4,5 |
| Vladimir Epishin | (2599) | 4,5 |
| Artyom Timofeev | (2611) | 4,5 |
| Vitaly Tseshkovsky | (2577) | 2,5 |

H71-StÍF 25-33 (14-16):

# So sprellaðu strandingarnir

**Eftir ein laka byrjan, har einki hevur borið til, vundu strandingar seg upp, tá teir vitjaðu H71**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Higartil í ár hevur tað ikki verið nakað serliga stuttligt at vera StÍF-viðhaldsfólk. Eftir fleiri ár, har liðið støðugt hevur verið við til at mynda føroyska hondbóltsoddin, er kósin í ár umløgd nakað.
Boðini hava verið, at ungir leikarar nú skulu sleppa framat, og tí hava pengarnir ikki verið nýttir til útlendskan styrk hetta kappingarárið.
Og tó at liðið vann fyrsta dystin á árinum móti Neistanum, so hevur staðið í botni síðani. Altso fram til sunnudagin, tí tá riggaði aftur hjá strandingunum.

### Aftur á slóðina

Og tað var serliga við at leita aftur á slóðina, at tað hesaferð riggaði hjá StÍF.
Frá byrjan løgdu teir fyri við eini sera offensivari verju, har teir løgdu alstóran dent á at órógva stóru skjúttarnar hjá H71. Partvíst gav hetta útslag í, at hoyvíkingarnir gjørdust nógv minni vandamiklir, enn teir annars plaga at vera, og hartil fekk StÍF so eisini kontraálopini, sum áður vóru vørumerki teirra, men sum í ár hava mangla í ólukkumát.
Fram til steðgin leikaði tó rímiliga javnt á, men so varð enn ein trumfur sendur á vøllin. Síðani hálvfinaluna móti VÍF í steypakappingini í fjør, hevur Marian Cirloganescu verið skaddur í knænum, men nú røkist loksins fyri, at hann er tøkur aftur. Hesaferð fekk hann ein góðan hálvleik á vøllinum, og hóast tað man vera so sum so við dystarvenjingini, so sýndi hann í fleiri førum, at hann framvegis skal roknast millum avgjørt bestu málverjarnar í landinum.

### Spruttaðu av spæligleði

Hetta gav av álvara at bíta seinastu tjúgu minuttirnar. Líka mikið, hvussu hoyvíkingarnir royndu, so fingu teir bóltin í meskarnar, og tá stóru menninir so fóru út at fáa eina tiltrongda pausu, skrædnaði av álvara. StÍFspælararnir spruttaðu nú av spæligleði, og tá so er, so er ikki gott at standa fyri. Tá avtornaði, vóru átta mál á muni, og ikki minst munnu teir í StÍF fegnast um, at tað eydnaðist at halda mótstøðuni á einum so lágum málstali. Tað hevur fyrst og fremst verið verjuspælið, sum hevur haltað higartil í ár, men nú hetta er komið í rættlag aftur, er als ikki óhugsandi, at StÍF eisini fer at arga liðini, sum eru omanfyri H71 á talvuni.
Og so er spurningurin, hvørt hoyvíkingarnir nú eru fullkomuliga uppsteðgaðir. Tapið hesaferð økti ikki um frástøðuna til oddin, tí VÍF eisini var fyri tapi. Men skal liðið halda fast um støðuna sum avbjóðari, so má vend koma í nú. Komandi vikuskifti skulu teir royna seg móti Kyndli, og tað plagar at borga fyri spenningi.

## FAKTA UM DYSTIN

**H71-StÍF 25-33 (14-16)**
**Málskjúttar**
**H71:** Henrki Gerster 6(2), Halgir Dahl Olesen 4, Piti Negru 4, Johnny Durhuus 4, Esbern Patursson 3, Heini Bendtsen 2, Birgir Kass 1, Olaf Vesturgarð 1
**StÍF:** Sveinur Justinussen 8, Alexandur Johansen 5(1), Artur Johansen 5, Borgar Danielsen 5, Bent Djurhuus 4, Bárður Danielsen 3, Leivur Justinussen 1, Jón Rasmussen 1, André F. Danielsen 1
**Brotskøst:** H71 3, StÍF 3
**Útvísingar:** H71 10, StÍF 4
**Dómarar:** Uni Wardum & Hannis Wardum

# Talvið hesa vikuna

GM Timofeev (2611) — GM Kasparov (2813)
57th ch-RUS Moscow (9. umfar), 25.11.2004

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.Bc4 (Timofeev hættaði sær ikki út í vælkendar teoriir í Naidorf variantinum, sum Kasparov kennir til fulnar) 3...Rif6 4.d3 Ric6 5.c3 g6 6.0—0 Bg7 7.Bb3 0—0 8.Re1 b5 9.a3 a5! (Kasparov hevur initiativið, men støðan er framvegis nøkunlunda jøvn) 10.h3 Rid7 11.Be3 a4 12.Bc2 Rib6 13.Ribd2 e5 (Steðgar d4) 14.b4 axb3 15.Bxb3 Bd7 16.Fc2 Ra6 17.Reb1 Fa8 18.Fc1 Ria5 19.Ba2 Fc6 20.d4 c4 21.dxe5 dxe5 22.Bxb6 Rxb6 23.a4 (Framvegis er tað svartur sum trýstir. Hvítur roynir eitthvørt kontra við a4 leikinum) 23...bxa4 24.Rxb6 Fxb6 25.Rixc4 Rixc4 26.Bxc4 Fc5! 27.Fd1 Fxc4 28.Fxd7 Fxe4 29.Fxa4 Fd3 30.c4 e4 31.Rd1 Fe2! 32.Nh2 (Ikki ber til at leika: 32.Re1?? exf3!! 33.Rxe2 fxe2 34.Fa5 Re8 35.Fe1 Bc3 og svartur vinnur) 32...Bc3 (Hóttann er Be1) 33.Rf1 Bd4 34.Fc6 h5! (Hvíti riddarin er væl goymdur nú) 35.Fd5 Fd3 36.g4? (Panikkur, men hvat skuldi hvítur leikt? c5 bar ikki til orsakað av Bxf2+ og Fxd5) 36...hxg4 37.hxg4 Kg7 38.Kg2 Rh8 39.Fd6 Fh3+ 40.Kg1 Fd3 41.Kg2 (41.Ff4 e3! er avgerandi) 41...Fh3+ 42.Kg1



Støðumynd eftir 42.Kg2

42...Fc3! Og Timofeev fær ikki vart fyri Be5. Frálík og orkurík telving av russiska meistaranum 2004 0—1